# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Nú 10 prosent av atkvøðunum eru taldar, havi eg vunnið argentinska forsetavalið við stórum meiriluta*
*(Christina Kirchner)*

## Einki lívstekin úr holvdum skipi

**Kavarar funnu ongan av teimum sjey, sum ikki eru komin afturíaftur, eftir at eitt slovakiskt farmaskip holvdist í Eystrasalti í gjár**

Slovakiska skipið »Omer N« holvdist einar 15 fjórðingar úr Gedser. Tað fór á bakborð, og allur yvirbygningurin fór undir. Tíggju menn og ein kvinna vóru við, og tað eydnaðist einum russiskum farmaskipi at bjarga trimum monnum á lívi. Ein tyrla fann ein fjórða mann, men hann var deyður. Teir tríggir menninir, sum vórðu bjargaðir á lívi, eru millum 19 og 24 ár.

Í morgun varð avgjørt at senda kavarar at vita, um nakað var at hoyra til hini sjey, sum eftir øllum at døma eru í tí holvda skipinum. Men kavararnir hoyrdu einki lívstekin. Danska bjargingartænastan sigur, at tey sjey kunnu vera á lívi í onkrum luftrúmi í skipinum, og tí er ætlanin at gera eina roynd afturat at vita, um nakað er at hoyra til teirra.

Øll manningin á »Omer N« er úr Turkalandi. Tað er ikki greitt, hví tað 73 metrar langa skipið holvdist.



*Hendan myndin av »Omen N« varð tikin fyri tveimum árum síðani. Tá æt skipið »Can Gio«*

## Jarðað av nýggjum



*Ukrainskir hermenn jarðaðu tey 1.998 líkini uttan fyri Kiev*

**1.998 fólk, sum loyniliga sovjetska løgreglan myrdi beint fyri seinna heimsbardaga, vórðu um vikuskiftið jarðað av nýggjum**

Í árunum frá 1937 til 1941 myrdu drápslið hjá loyniligu sovjetsku løgregluni NKVD meiri enn 30.000 fólk í Ukraina og jarðaðu tey í tilvildarligum hópgravum. Leygardagin vórðu leivdirnar av 1.998 fólkum jarðað av nýggjum í einari hópgrøv.

Leivdirnar av teimum 1.998 vórðu funnin í einum skógi nærhendis ukrainska høvuðsstaðnum Kiev fyrr í ár. Myndugleikarnir gjørdu av at grava líkini uppaftur og at geva teimum eina virðiliga jarðarferð. Fleiri hundrað fólk vóru til jarðarferðina, og summi teirra bóru skelti við áheitan á fólk um ikki at gloyma harðskapin hjá Stalin-stýrinum.

Ukrainsku myndugleikarnir vilja vera við, at millum 30.000 og 40.000 fólk vórðu myrd og tveitt í hópgravir í 30- og 40-árunum.

## Skuldu smugla børn við íslendskum flogfari

**Myndugleikarnir í Tjad hava forðað fyri, at meiri enn 100 børn vórðu flutt av landinum**

Myndugleikarnir í Tjad hava tikið fleiri fólk, sum verða løgd undir at hava havt ætlanir um at ræna tey meiri enn 100 børnini og at fara av landinum við teimum. Tey tiknu vilja harafturímóti vera við, at ætlanin er at flyta børnini til Fraklands fyri at verja tey, og at hetta er í samsvari við altjóða reglur.

Sambært Reuters hava myndugleikarnir avdúkað, at fleiri av børnunum høvdu bind um bein og armar, hóast tey einki mein høvdu fingið. Børnini, sum er millum trý og átta ára gomul, eru nú í einari legu í Tjad.

Tey, sum skuldu flyta børnini úr Tjad til Fraklands, høvdu leigað eitt flogfar til endamálið. Sambært íslendskum fjølmiðlum er talan um eitt flogfar, sum eitt dóttirfelag hjá Icelandair eigur, men sum eitt spanskt felag hevur leigað.




*Eitt íslendskt flogfar skuldu flyta børnini úr Tjad til Fraklands*
*(Mynd: Vísir)*

### STUTT SAGT

#### Víkir lítið frá grundlógini

Tað er ikki rætt, tá Anders Fogh Rasmussen og aðrir evropeiskir leiðarar siga, at tann nýggja semjan úr Lissabon víkir nógv frá tí grundlógaruppskotinum, sum fransmenn og niðurlendingar vrakaðu, og sum tí bleiv løgd í skuffuna. Tað sigur fyrrverandi franski forsetin Valdey Giscard d'Estaing, sum var ein av høvuðsmonnunum aftan fyri grundlógaruppskotið. Í opnum brævi í Politiken skrivar fyrrverandi forsetin, at innihaldið í Lissabon-semjuni er tað sama sum í grundlógaruppskotinum. Tann einasti munurin er, at innihaldið er øðrvísi skipað.

#### Darfur-ráðstevna fyri bakka

Ein roynd at fáa enda á borgarakrígnum í sudanska landspartinum Darfur miseydnaðist um vikuskiftið. Skipað varð fyri einari ráðstevnu í Libya, men tá samráðingarnar skuldu byrja, sýttu umboðini hjá tveimum uppreistrarbólkum fyri at koma á fund. Undan ráðstevnuni hevði sudanska stjórnin sagt, at hon var til reiðar at lýsa vápnahvíld í Darfur, men tveir av uppreistrarbólkunum siga, at einki hald er í lyftinum hjá stjórnini. Tí sýttu teir fyri at koma til samráðingarborðið.

#### Rýmdi frá upptøku

Franski forsetin, Nicolas Sarkozy, hevur fleiri ferðir sagt, at hann vil fegin hava góð viðurskifti við USA og amerikanarar, men kortini gjørdi hann av at rýma mitt í einari upptøku til ta kendu sjónvarpssendingina 60 minuttir. Upptøkan fór fram á forsetaborgini í Paris. Sambært fronskum fjølmiðlum reistist Sarkozy og rýmdi, tá amerikanski sjónvarpsmaðurin byrjaði at spyrja um forsetan um hansara hjúnarskilnað fyrr í mánaðinum.